SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

# Glasir

## Spurningar til byggiharran/Landsverk og umbøn um frágreiðing í samband við bygingina av Glasi

**Samferðslumálaráðið**

4. des. 2018

# Innihald

**Innleiðing** ... 3

**Spurningar:** ... 4

**Málsgongdin og týðandi hendingar:** ... 4

**Fyrireikingararbeiði:** ... 4

**Skipan og projektbygnaður:** ... 4

**Ráðgevara- og projekteringsarbeið:** ... 4

**Byggiarbeiðið:** ... 5

**Fíggjarstýring:** ... 6

**Prístalsreguleringar:** ... 6

**Tíðarstýring:** ... 6

**Váðastýring:** ... 7

**Samskifti og kunning:** ... 7

**Handlings- og spariætlanir:** ... 8

**Fylgiskjal 1: Skipan av svarum uppá spurningar** ... 9

**1 Lýsing av málsgongdini síðani byrjan** ... 9

**2 Fyrireikingararbeiðið** ... 9

**3 Skipan/projektbygnaður fyri verkætlanina** ... 10

**4 Ráðgevara- og projekteringsarbeiði** ... 11

**5 Byggiarbeiði** ... 13

**6 Fíggjarstýring av byggiverkætlanini** ... 16

**7 Tíðarstýring av byggiverkætlanini** ... 18

**8 Váðastýring** ... 20

**9 Samskifti/kunning um fíggjarviðurskiftini og tíðarætlan fyri verkætlanina** ... 21

**10 Handlings- og spariætlanir** ... 22

**Fylgiskjal 2: Vegleiðandi skabelón til dagføring av høvuðspostum og frávikum** ... 23

# Innleiðing

Vísandi til fráboðan dagfest 28. november 2018 um at seta í verk eina gjøgnumgongd av byggimálinum fyri Glasir, verður niðanfyri heitt á Landsverk (LV) um at svara rupp á fleiri og meiri nágreinaðar spurningar. Svarfreistin er mikudagin 12. desember.

---

Skipanarliga hoyrir LV undir Samferðslumálaráðið (SMR), og LV hevur ein lyklaleiklut í samband við byggiverkætlanir hjá landinum. LV hevur vanliga leiklutin sum byggiharra mótvegis ráðgevarum, arbeiðstakarum, myndugleikum v.fl. LV hevur eisini røkt henda leiklut í samband við byggingina av Glasir.

Landsgrannskoðanin (LG) gjørdi í januar 2017 eitt upprit til løgtingsgrannskoðararnar um játtanar- og útreiðslugongdina í sambandi við verkætlanina at byggja Skúladepil við Marknagil. Hóast uppritið hjá LG gevur eina góða lýsing av málsgongdini, má staðfestast, at støðan er nakað øðrvísi í dag enn tá.

Endamálið við gjøgnumgongdini og svarunum upp á spurningarnar er í fyrstu atløgu at fáa eina mynd av leiklutinum hjá LV í samband við verkætlanina Glasir. Tá ið frágreiðingin er liðug, fer SMR at viðgera hana og at gera niðurstøður, um ella hvussu farast skal víðari við málinum, og møguliga meta nærri um, hvussu almennar byggiverkætlanir frameftir kunnu verða betri skipaðar og stýrdar.

Mentamálaráðið (MMR) er bygningsánari av Glasir. SMR hevur ikki myndugleika at kanna onnur aðalráð í samband við hesa gjøgnumgongdina, men givið er, at við tí leisti, sum landið vanliga nýtir til stýring av byggiverkætlanum, eru ymisk markamót millum bygningsánaran MMR og byggiharran LV.

Fyri at fáa eina mynd av gongdini í málinum, og orsøkir til frávikini í mun til kostnaðarætlan og tíðarætlan v.m, verður LV biðið um svar uppá niðanfyri standandi spurningar. Spurningarnir snúgva seg m.a um skipanarlig viðurskifti, verkætlanarleiðsluna hjá LV, sáttmálaviðurskifti fyri verkætlanina fyri bæði ráðgevarar og arbeiðstakarar, fíggjarstýring, tíðarstýring, váðastýring, samskifti og kunning og annað, sum verður mett viðkomandi fyri málið.

Hóast SMR ikki hevur myndugleika at kanna onnur aðalráð, eru tó nakrir spurningar um viðurskifti í MMR, sum er bygningsánari. Hetta tí, at tað er sera týðandi fyri at fáa eina rættvísandi mynd av málinum, og at samstarvið, samskiftið og kunningin ímillum LV og MMR verður lýst.

Svarini uppá spurningarnar skulu í minsta lagi innihalda frágreiðingar og svar uppá tey punkt, sum eru sett upp í hjálagda fylgiskjali 1, og so vítt gjøligt skipast eftir hesum fylgiskjali, so SMR kann gera egnar metingar og niðurstøður um ymsu viðurskiftini í málinum, grunda á svar og frágreiðingar frá LV. Fylgiskjalið er tó ikki úttømandi, og forðar ikki LV í at greiða frá viðurskiftum, sum ikki eru beinleiðis nevnd i fylgiskjali 1.

Umframt svar uppá spurningarnar, verður LV eisini biðið um at at seta upp eina dagførda kostnaðarmeting, við upprunakostnaði og frávikum, fyri mest týðandi postarnar, sambært vegleiðandi skabelónini í fylgiskjali 2.

---

Vinarliga

Heðin Mortensen,
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen
aðalstjóri

# Spurningarnir

Málsgongdin og týðandi hendingar:

1. Byggiharrin verður biðin um at lýsa gongdina í málinum frá byrjan í 2008 til í dag, herundir um allar týðandi hendingar sosum ósemjur við ráðgevarar og arbeiðstakarar, ráðgevarafeilir, byggifeilir og onnur týðandi viðurskifti hjá pørtum í málinum, sum hava havt týdning fyri meirkostnað, avsetingar og tíðarætlanina.

Fyrireikingararbeiði:

2. Byggiharrin verður biðin um at lýsa fyrireikingararbeiðið til at gjøgnumføra verkætlanina, herundir byggiskrá og málsetningarnir fyri bygginguna. Somuleiðis verður biðið um lýsing av arkitekta-kappingini og úrslitið av henni.

3. Metir Landsverk at fyrireikingararbeiðið gav eitt nøktandi grundarlag til at takað avgerð um at seta verkætlanina í gongd ?

4. Metir Landsverk, at tað fyrilá ein realistisk kostnaðarmeting og fígging, sum eisini fevndi um avseting til mettar váðar og óvæntaðar útreiðslur, tá avgerð varð tikin um at seta bygginguna í gongd ?

Skipan og projektbygnaður:

5. Byggiharrin (Landsverk) verður biðin um at lýsa bæði yvirskipaða bygnaðin og umsitingarligu skipanina í samband við verkætlanina hjá bæði Landsverk og hjá Mentamálaráðnum, sum bygningsánari.

6. Metir Landsverk, at bygnaðarliga og umsitingarligar skipanin sum varð sett í verk, var egna til á nøktandi hátt at standa fyri verkætlanarstýringini hjá byggiharra og bygningsánara ?

7. Metir Landsverk, at bygningsánarin og byggiharrin ígjøgnum alla projektgongdina, hava tryggjað fullgóða samskipan og samstarv sínamillum um verkætlanina ?

8. Metir Landsverk, at projektleiðslan hevði neyðugar ressursir og var fakliga ment at standa fyri eini effektivar stýring av verkætlanini ?

9. Metir Landsverk, at projektleiðslan ígjøgnum alla projektgongdina, hevur tryggja fullgóða samskipan og samstarv millum allar partar í verkætlanini, herundir millum ráðgevarar, arbeiðstakarar og onnur ?

Ráðgevara- og projekteringsarbeiðið:

10. Byggiharrin verður biðin um at lýsa viðurskiftini í samband við allar ráðgevaraveitingar og projekteringsarbeiðið, herundir innihald, prísavtalur og ábyrgdarviðurskifti í ráðgevarasáttmálum.

11. Byggiharrin verður biðin um at lýsa týðandi frávik frá avtalaðu projekteringstíðarætlanini og ráðgevaraveitingunum, herundir staðfestar projekteringsfeilir, manglar, seinkingar o.l, umframt orsøkir og avleiðingar av slíkum frávikum.

12. Metir Landsverk, at projekteringsleiðslan og ráðgevarar hava hildið sínar sáttmálabundnu skyldur viðv. tíðarætlan og ráðgevaraveitingum.

13. Metir Landsverk, at projekteringsleiðslan ígjøgnum alla projektgongdina, hevur tryggjað fullgóða samskipan og samstarv millum allar ráðgevarar og aðrar partar í verkætlanini ?

Byggiarbeiðið:

14. Byggiharrin verður biðin um at lýsa grundleggjandi viðurskiftini í samband við allar arbeiðstøkur og veitingar, herundir útboðshátt, innihald í arbeiðstøkum, prísavtalur og ábyrgdarviðurskifti í arbeiðstøku- og veitarasáttmálum.

15. Byggiharrin verður eisini biðin um at útgreina avtalaðar sáttmálaásetingar um viðurskifti, sum hava við óvissur at gera, herundir tilfarsveitingar, arbeiðsmegi, feilir og manglar, meir- og minniveitingar og eykaarbeiðir.

16. Byggiharrin verður biðin um at lýsa avbjóðingarnar og avleiðingarnar av at skifta arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar og/ella aðrar veitarar ella undirveitarar í byggitíðarskeiðnum.

17. Byggiharrin verður eisini biðin um at lýsa týðandi frávik frá avtalaðu arbeiðstøkunum og veitingunum, herundir møguliga feilir, manglar, seinkingar, umframt orsøkirnar til hetta og avleiðingarnar av slíkum frávikum.

18. Metir Landsverk, at arbeiðstakararnir ígjøgnum alla projektgongdina, hava tryggja fullgóða samskipan og samstarv millum allar arbeiðstakarar og aðrar partar á byggiplássinum ?

19. Metir Landsverk, at tað eru arbeiðstakarar, sum ikki hava hildið sínar sáttmálabundnu skyldur viðv. veitingum og tíðarætlan v.m.

20. Í samband við avleveringina eru staðfestir týðandi manglar. Metir Landsverk, at byggingin var yvirtikin ov tíðliga og við ov nógvum og týðandi manglum ?

21. Vóru aðrar ella serligar orsøkir til, at byggingin varð yvirtikin við staðfestum, týðandi manglum ?

22. Viðføra manglar, sum vóru staðfestir við avleveringina, øktar útreiðslur, ella er talan um manglar, sum liggja innanfyri sáttmálakostnaðin ?

Fíggjarstýring:

23. Byggiharrin verður biðin um at lýsa viðurskiftini í samband við fíggjarligu stýringina av verkætlanini, herundir játtanir, kostnaðarætlanir, nýtsla, gjaldføri, frávik og onnur týðandi viðurskifti.

24. Metir Landsverk, at broyttar/endurskoðaðar kostnaðarmetingar, sum gjørdar eru í byggitíðarskeiðnum, hava verið gjøgnumarbeiddar og realistiskar ?

25. Byggiharrin verður biðin um at lýsa týðandi fíggjarlig frávik, umframt orsøkirnar til hetta og avleiðingarnar av slíkum frávikum.

26. Metir Landsverk, at bygningsánari, byggiharri ella projektleiðslan vóru orsøk til ella eiga lut í meirkostnaðum ?

27. Byggiharrin verður biðin at lýsa, hvussu fíggjarstýringin virkaði sum stýringsamboð, og um kunningina, sum varð veitt innanhýsis, um fíggjarligu støðuna og frávik.

28. Byggiharrin verður biðin um at lýsa nýggjastu kostnaðarmetingina, við upprunakostnaði og frávikum, fyri mest týðandi postarnar, sambært vegleiðandi skabelónini í fylgiskjal 2.

29. Byggiharrin verður biðin um at lýsa sínar egnu ”best case” og ”worst case” metingar av, hvussu stórur partur av útleggum, avsetingum til gerðarrættarmál ella annað, tryggingarendurgjøld, garantiir, minniveitingar og mótkrøv o.l. kunnu inntøkuførast, og hvønn týdning tað fær fyri endaliga byggiroknskapin.

30. Metir Landsverk, at fíggjarliga stýringin var skipað á nøktandi hátt, og at fíggjarstýringin var effektiv og loypandi dagførd ?

Prístalsreguleringar:

31. Byggiharrin verður biðin um at lýsa øll viðkomandi viðurskifti viðv. prístalsreguleringum av sáttmálaupphæddin við ráðgevarar, arbeiðstakarar og aðrar veitarar, í samband við, at verkætlanin hevur strekt seg yvir nógv ár. Metir Landsverk, at valdi leisturin fyri prístalsreguleringar hevur viðført týðandi frávik frá kostnaðarmetingum og avsetingum til prístalsreguleringar ?

Tíðarstýring:

32. Byggiharrin verður biðin um at lýsa viðurskiftini í samband við tíðarstýringina av verkætlanini, herundir tíðarrætlanir, staðfest tíðarnýtsla, orsøkir til frávik og onnur týðandi viðurskifti.

33. Metir Landsverk, at tað fyrilá ein gjøgnumarbeidd og realistisk tíðarætlan fyri verkætlanina, tá avgerð varð tikin um at seta byggingina í gongd, og at seinni broyttar/endurskoðaðar tíðarætlanir hava verið gjøgnumarbeiddar og realistiskar ?

34. Byggiharrin verður biðin um at lýsa týðandi frávik frá avtalaðum tíðarætlanum, umframt orsøkirnar til hetta og avleiðingarnar av slíkum frávikum.

35. Metir Landsverk, at bygningsánari, byggiharri ella projektleiðslan vóru orsøk til ella eiga lut í tíðarseinkingum ?

36. Byggiharrin verður biðin um at lýsa hvussu tíðarstýringin virkaði sum stýringsamboð, og um kunningina, sum varð veitt innanhýsis um støðuna viðv. tíðarætlanini, og frávik.

37. Metir Landsverk, at tíðarstýringin varð skipað á nøktandi hátt, og at hon var effektiv og loypandi dagførd ?

Váðastýring:

38. Byggiharrin verður biðin um at lýsa viðurskiftini í samband við váðastýringina av verkætlanini, bæði í mun til kostnaðarætlanir, tíðarrætlanir, og onnur viðkomandi kvalitativ og kvantitativ viðurskifti.

39. Byggiharrin verður biðin um at lýsa, hvørjar váðametingar vóru gjørdar viðv. projektering og bygging, í samband við at talan er um eitt serligt og avbjóðandi bygningsnið.

40. Byggiharrin verður biðin um neyvt at lýsa, hvussu váðametingar vóru nýttar sum stýringsamboð, og um kunningina, sum varð veitt innanhýsis um váðametingar viðv. fíggjarligum viðurskiftum, tíðarætlan og øðrum týðandi viðurskiftum fyri verkætlanina.

41. Byggiharrin verður biðin um at lýsa váðametingar og grundarlagið annars, fyri metingini um, at sparingar fyri 92 mió. kr. kundu fremjast í mun til samlaða lisitatiónsúrslitið 28. aug. 2012, uttan at tað gekk útyvir funktionalitet, virksemið á skúlanum, heildina og ásettu krøvini í byggiskránni, soleiðis sum upplýst í almennu viðmerkingunum til Løgtingsmál nr. 104/2012.

42. Metir Landsverk framvegis, at hendan metingin og avgerðin um sparingarnar í 2012/2013 bygdi á haldgott grundarlag og var røtt ?

43. Metir Landsverk, at ráðgevaratoymið og arbeiðstakarar høvdu fakligar førleikar og neyðugar royndir at projekterað og byggja bygningin, við tí avbjóðandi bygningssniðinum, konstruktiónum o.l. ?

44. Byggiharrin verður biðin um at lýsa, hvørjar váðametingar vórðu gjørdar ad hoc í samband við serligar hendingar, sosum sáttmálaslitið við TG Verk, projekteringsfeilir o.l., herundir um váðametingar vóru gjørdar av fyrimunum og vansum við at støðga verkætlanini fyribils.

45. Metir Landsverk, at váðastýringin var skipað á nøktandi hátt, og at hon var effektiv ?

Samskifti og kunning:

46. Byggiharrin verður biðin um at lýsa skipanina fyri regluliga og ad hoc kunning um fíggjarviðurskifti, tíðarætlan og týðandi váðar, til leiðslu hjá Landsverk og hjá Mentamálaráðnum.

47. Nær og hvussu kunnaði projektleiðslan leiðslur og ábyrgdarpersónar hjá Landsverk og Mentamálaráðnum um týðandi váðar, meirkostnaðir og frávik frá kostnaðarætlan og tíðarætlan ?

48. Metir Landsverk, at leiðslan og ábyrgdarpersónar hjá Landsverk og Mentamálaráðnum hava fingið nøktandi og rættstundis kunning um fíggjarstøðu, tíðarætlan og týðandi váðar við verkætlanini ?

Handlings- og spariætlanir:

49. Byggiharrin verður biðin um at greiða frá, hvussu leiðslur og ábyrgdarpersónar hjá Landsverk og Mentamálaráðnum hava tryggja at tað var nóg stórt fokus á fíggjarligu viðurskiftini og tíðarætlan v.m, og at neyðugar avgerðir vóru tiknar rættstundis, tá trupulleikar í verkætlanini tóku seg upp.

50. Byggiharrin verður somuleiðis biðin um at greiða frá um og nær tillagingar vóru gjørdar av m.a. projektstýringsskipanini, byggileiðsluni og av mannagongdum, og hvørjar handlings- og spariætlanir hava verið settar í verk í samband við tær royndir og staðfestingar sum gjørdar vóru loypandi í samband við munandi fíggjarlig og onnur frávik og í samband við feilir og ósemjur í málinum.

51. Hvussu fylgdu leiðslur og ábyrgdarpersónar hjá Landsverk og Mentamálaráðnum slíkum handlings- og sparikætlanum upp ?

52. Byggiharrin verður biðin um at greiða frá handlingsætlanini í samband við manglar og liðugtgerð av bygninginum v.m., og hvussu tryggja er, at bygningurin er tryggur og nýtiligur, til alt arbeiðið er liðugt.

53. Geva manglarnir, sum staðfestir eru við og aftaná avleveringina, orsøk til at reisa krøv móti ráðgevum, arbeiðstakarum ella øðrum pørtum ?

# Fylgiskjal 1: Skipan av svarum uppá spurningar

## 1 Lýsing av málsgongdini síðani byrjan

### 1.1 Málsgongdin og týðandi hendingar

1.1.1 Málsgongdin og týðandi hendingar 2008

1.1.2 Málsgongdin og týðandi hendingar 2009

1.1.3 Málsgongdin og týðandi hendingar 2010

1.1.4 Málsgongdin og týðandi hendingar 2011

1.1.5 Málsgongdin og týðandi hendingar 2012

1.1.6 Málsgongdin og týðandi hendingar 2013

1.1.7 Málsgongdin og týðandi hendingar 2014

1.1.8 Málsgongdin og týðandi hendingar 2015

1.1.9 Málsgongdin og týðandi hendingar 2016

1.1.10 Málsgongdin og týðandi hendingar 2017

1.1.11 Málsgongdin og týðandi hendingar 2018

## 2 Fyrireikingararbeiðið

### 2.1 Byrjan av verkætlanini

2.1.1 Avgerðargrundarlag

2.1.2 Forkanningar og planlegging

2.1.3 Byggiskrá

2.1.4 Fyrstu kostnaðar- og fíggjarætlaninar fyri byggiverkætlanina

2.1.5 Fyrstu tíðarætlaninar fyri byggiverkætlanina

### 2.2 Arkitektakappingin

2.2.1 Avgerðargongdin og grundgevingar fyri vinnandi uppskotinum

2.2.2 Kostnaðarmeting av vinnandi uppskotinum

2.2.3 Annað viðkomandi avgerðargrundarlag

# 3 Skipan/projektbygnaður fyri verkætlanina

## 3.1 Yvirskipaður projektbygnaður

3.1.1 Projektbygnaður hjá bygningsánara (Mentamálaráðið) í samband við verkætlanina

3.1.2 Projektbygnaður hjá byggiharra (Landsverk) í samband við verkætlanina

3.1.3 Projektbygnaðurin í samband við verkætlanina fyri onnur viðkomandi aðalráð og stovnar

## 3.2 Yvirskipað umsiting av byggiverkætlanini

3.2.1 Yvirskipað umsiting av verkætlanini hjá bygningsánara (Mentamálaráðið)

3.2.2 Yvirskipað umsiting av verkætlanini hjá byggiharra (Landsverk)

3.2.3 Stýrisbólkur

3.2.4 Bygginevnd

3.2.5 Arbeiðsbólkar

3.2.6 Fylgibólkar

3.2.7 Umsitingarlig leiðsla

3.2.8 Projektleiðsla byggiharrans (Landsverk)

3.2.9 Projektleiðsla bygningsánarans (Mentamálaráðið)

3.2.10 Samskipan millum bygningsánara (Mentamálaráðið), byggiharra (Landsverk), ráðgevarar og arbeiðstakarar

# 4 Ráðgevara- og projekteringsarbeiði

## 4.1 Valdur leistur fyri skipan av ráðgeving

4.1.1 Ráðgevarar
4.1.2 Undirráðgevarar
4.1.3 Aðrir serráðgevarar
4.1.4 Aðrar ráðgevaraveitingar ella serveitingar
4.1.5 Projekteringsleiðsla,
4.1.6 IKT-leiðsla
4.1.7 Projektuppskot
4.1.8 Myndugleikaprojekt
4.1.9 Útboðsprojekt
4.1.10 Framleiðsluprojekt
4.1.11 Innanhýsis projektgransking/góðskutrygging
4.1.12 Tvørfaklig projektgransking/góðskutrygging
4.1.13 Byggileiðsla undir bygging og avlevering
4.1.14 Fakeftirlit undir bygging og avlevering
4.1.15 Projektuppfylging undir bygging og avlevering
4.1.16 Garantisýn 1 ár og 5 ár

## 4.2 Ráðgevarasáttmálar

4.2.1 Innihald og veitingar hjá ymsu ráðgevunum, sambært sáttmálum
4.2.2 Fastur prísur og/ella onnur avtalað avrokning av ráðgevaraveitingum
4.2.3 Góðkendir undirráðgevarar og serráðgevarar
4.2.4 Umprojekteringar og ráðgevarafeilir
4.2.5 Ábyrgdartryggingar hjá ráðgevum og undirráðgevum
4.2.6 Markamót millum ráðgevarar

## 4.3 Projekteringstíðarætlan

4.3.1 Projekteringstíðarætlan fyri verkætlanina
4.3.2 Broytingar av projekteringstíðarætlanini
4.3.3 ”Kritisk tíðarlinja/-ur” í projekteringstíðarætlanini
4.3.4 Samsvar millum projekteringstíðarætlan og byggitíðarætlan

### 4.4 Innihald í loypandi projekteringstíðarstýringini

4.4.1 Statusfrágreiðingar

4.4.2 Mánaðarligar frágreiðingar

4.4.3 Loypandi projekteringstíðarætlan

4.4.4 Kvart-, hálv- ella heilárligar frágreiðingar

4.4.5 Samskipan millum ymsar ráðgevarar og millum ráðgevarar og projekterandi arbeiðstakarar

### 4.5 Innihald í regluligum gjøgnumgongdum av projekteringstíðarætlan

4.5.1 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um gongdina viðv. projekteringstíðarætlanini

4.5.2 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um seinkingar og orsøkir til tess í projekteringstíðarætlanini

4.5.3 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um longda projekteringstíðarætlan orsakað av feilum, umprojekteringum, eyka projektering o.l.

4.5.4 Nær vóru seinkingar í projekteringstíðarætlanini settar inn í regluligu frágreiðingarnar um gongdina við verkætlanini

### 4.6 Týðandi frávik frá projekteringstíðarætlanum

4.6.1 Nær skuldi projekteringsarbeiði eftir upprunaliga avtalaðu tíðarætlanini verða liðugt, fyri ávikavist projektuppskot, myndugleikaprojekt, útboðsprojekt og framleiðsluprojekt

4.6.2 Nær og hvussu nógv var projekteringstíðarætlanin fyri verkætlanina broytt

4.6.3 Hvørji projekteringsfak hava havt størstu seinkingarnar við sær

4.6.4 Hvørjir ráðgevarafeilir og/ella manglar hava havt størstu seinkingarnar við sær

4.6.5 Hvussu nógv kundu seinkingar vinnast innaftur við framskundan av projekteringsarbeiðum ("forcering")

4.6.6 Var manglandi projekttilfar frá ráðgevum orsøk til nakra tíðarseinking fyri byggiarbeiðið

4.6.7 Vóru seinkingar hjá ráðgevum orsøk til seinkingar og/ella eykakrøv hjá øðrum ráðgevum

4.6.8 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá projektleiðsluni orsøk til nakra tíðarseinking av projekteringini

4.6.9 Vóru manglandi avgerðir hjá byggiharranum (Landsverk) orsøk til nakra tíðarseinking av projekteringini

4.6.10 Vóru manglandi avgerðir hjá bygningsánara (Mentamálaráðið) orsøk til nakra tíðarseinking av projekteringini

# 5 Byggiarbeiði

## 5.1 Valdur leistur fyri byggiarbeiði

5.1.1 Val at útboðshátti fyri byggiarbeiðstøkur

5.1.2 Val av arbeiðstakara/-um

5.1.3 Góðkenning av undirarbeiðstakarum

5.1.4 Val at útboðshátti fyri aðrar veitingar

5.1.5 Val av veitara/-um

5.1.6 Góðkenning av undirveitarum

## 5.2 Arbeiðstøkusáttmálar

5.2.1 Innihald og veitingar hjá ymsu arbeiðstakarunum, sambært sáttmálum.

5.2.2 Sáttmálagrundarlag fyri arbeiðstakarar og undirarbeiðstakarar

5.2.3 Fastur prísur og/ella onnur avtalað avrokning av arbeiðstakaraveitingum

5.2.4 Arbeiðstakaraprojektering

5.2.5 Sáttmálaásetingar um tilfarsveitingar arbeiðstakaranna

5.2.6 Sáttmálaásetingar um arbeiðsmegi arbeiðstakaranna

5.2.7 Sáttmálaásetingar um feilir og manglar arbeiðstakaranna

5.2.8 Sáttmálaásetingar um meir- og minniveitingar arbeiðstakaranna

5.2.9 Sáttmálaásetingar um eykaarbeiðir arbeiðstakaranna

5.2.10 Trygd hjá arbeiðstakarum

5.2.11 Ábyrgdartryggingar hjá arbeiðstakarum og undirarbeiðstakarum

5.2.12 Markamót millum ymsar arbeiðstakarar og millum arbeiðstakarar og undirarbeiðstakarar

5.2.13 Markamót millum arbeiðstakarar og aðrar veitarar

5.2.14 Munir millum upprunaligu arbeiðstøkusáttmálarnar og arbeiðstøkusáttmálar við arbeiðstakarar og undirarbeiðstakarar, sum yvirtóku arbeiðstøkur frá øðrum arbeiðstakarum og/ella undirarbeiðstakarum í byggitíðini.

### 5.3 Aðrir veitarasáttmálar

5.3.1 Innihald og veitingar hjá ymsum veitarum, sambært sáttmálum
5.3.2 Sáttmálagrundarlag fyri aðrar veitingar og undirveitarar
5.3.3 Fastur prísur og/ella onnur avtalað avrokning av øðrum veitingum
5.3.4 Veitara-projektering
5.3.5 Sáttmálaásetingar um tilfarsveitingar veitaranna
5.3.6 Sáttmálaásetingar um arbeiðsmegi veitaranna
5.3.7 Sáttmálaásetingar um feilir og manglar veitaranna
5.3.8 Sáttmálaásetingar um meir- og minniveitingar veitaranna
5.3.9 Sáttmálaásetingar um eykaarbeiðir veitaranna
5.3.10 Trygd hjá veitarum
5.3.11 Ábyrgdartryggingar hjá veitarum og undirveitarum
5.3.12 Markamót millum ymsar veitarar og millum veitarar og undirveitarar
5.3.13 Markamót millum veitarar og arbeiðstakarar
5.3.14 Munir millum upprunaligu veitarasáttmálarnar og veitarasáttmálar við veitarar og undirveitarar, sum yvirtóku veitingar frá øðrum veitarum og/ella undirveitarar í byggitíðini.

### 5.4 Innihald í loypandi byggiplásstýringini

5.4.1 Statusfrágreiðingar
5.4.2 Mánaðarligar frágreiðingar
5.4.3 Loypandi byggitíðarætlan
5.4.4 Kvart-, hálv- ella heilárligar frágreiðingar
5.4.5 Samskipan millum ymsar arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar, veitarar og undirveitarar

### 5.5 Innihald í regluligum byggifundum og aðrari byggiplássstýring

5.5.1 Hvat vístu regluligu gjøgnumgongdirnar um gongdina á byggiplássinum, herundir fíggjarviðurskifti, tíðarætlan, framdrift og annað ?
5.5.2 Hvat vístu regluligu gjøgnumgongdirnar um meir- og minniveitingar
5.5.3 Hvat vístu regluligu gjøgnumgongdirnar um eykaarbeiðir og hvussu avtalur vóru gjørdar um slík
5.5.4 Hvat vístu regluligu gjøgnumgongdirnar um nýtslu av avsettum peningi til ókent (reservar)
5.5.5 Hvat vístu regluligu gjøgnumgongdirnar um ávegis gjaldingar í mun til sáttmálaupphæddir
5.5.6 Nær vóru frávik inn í regluligu frágreiðingarnar og útreiðsluyvirlit

## 5.6 Týðandi frávik í samband við byggiarbeiði

5.6.1 Vóru týðandi broytingar gjørdar av byggingini í byggitíðini

5.6.2 Hvørjar arbeiðstøkur og arbeiðstakarar hava reist størstu eykakrøvini

5.6.3 Hvørjar avtalur eru gjørdar í samband við longda byggitíð og byggiplássrakstur

5.6.4 Hvørjar arbeiðstøkur eru framskundaðar (”forceraðar”), og hvussu nógv

5.6.5 Nær, hvussu og hvør hevur biðið um framskundan (”forcering”) av arbeiðum

5.6.6 Var manglandi projekttilfar og/ella seinkingar hjá ráðgevum orsøk til seinkingar hjá arbeiðstakarum

5.6.7 Vóru seinkingar hjá arbeiðstakarum orsøk til seinkingar hjá øðrum arbeiðstakarum

5.6.8 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá projektleiðsluni orsøk til manglandi framdrift á byggiplássinum

5.6.9 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá byggiharranum (Landsverk) orsøk til manglandi framdrift á byggiplássinum

5.6.10 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá bygningsánara (Mentamálaráðið) orsøk til manglandi framdrift á byggiplássinum

5.6.11 Aðrar orsøkir sum hava havt týðandi ávirkan á byggiarbeiðið og framdriftina á byggiplássinum

# 6 Fíggjarstýring av byggiverkætlanini

## 6.1 Fíggjarstýring bygningsánarans (Mentamálaráðið)

6.1.1 Skipan av fíggjarstýring bygningsánarans (Mentamálaráðið) av byggiverkætlanini

6.1.2 Fíggjarligar játtanir til verkætlanina

6.1.3 Hækkingar av fíggjarætlanini (nær og til hvat endamál)

6.1.4 Avsettir fíggjarreservar (buffari) til verkætlanina

6.1.5 Eftirlitsskipanir hjá bygningsánara

## 6.2 Fíggjarstýring byggiharrans (Landsverk)

6.2.1 Skipan av fíggjarstýring byggiharrans (Landsverk) av byggiverkætlanini

6.2.2 Lógargrundarlag

6.2.3 Verkætlanarhondbók

6.2.4 Aðrar leiðreglur til fíggjarstýring

6.2.5 Eftirlitsskipanir

## 6.3 Fíggjarætlan (kostnaðarmeting) fyri verkætlanina

6.3.1 Fíggjarætlan byggiharrans (Landsverk) fyri verkætlanina

6.3.2 Broytingar av fíggjarætlanini

6.3.3 Avsettir fíggjarreservar ("buffari") til verkætlanina

6.3.4 Avsetingar til prístalsreguleringar

6.3.5 Avsetingar í fíggjarætlan til framskundan ("forcering") av projekterings- og byggiarbeiðið

6.3.6 Aðrar týðandi avsetingar í fíggjarætlanini

## 6.4 Prístalsreguleringar

6.4.1 Valdur leistur fyri prístalsreguleringar av øllum veitingum og arbeiðum

6.4.2 Útgangsstøði fyri prístalsregulering av ráðgevaraveitingum

6.4.3 Mettar/framskrivaðar prístalsreguleringar av ráðgevaraveitingum

6.4.4 Eftirlitsskipanir

## 6.5 Innihald í loypandi fíggjarstýringini

6.5.1 Statusfrágreiðingar

6.5.2 Mánaðarligar frágreiðingar

6.5.3 Loypandi byggiroknskapir

6.5.4 Kvart-, hálv- ella heilárligar frágreiðingar

## 6.6 Innihald í regluligum uppgerðum

6.6.1 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um fíggjarligu gongdina
6.6.2 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um gongdina viðv. tíðarætlanini
6.6.3 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um meir- og minniveitingar
6.6.4 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um eykaarbeiðir
6.6.5 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um meirnýtslu
6.6.6 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um nýtslu av avsettum peningi til ókent (reservar)
6.6.7 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um gjaldføri/tøkan pening í mun til játtan og nýtslu
6.6.8 Nær vóru dýrkingar settar inn í regluligu frágreiðingarnar, byggiroknskapir og fíggjarætlanir

## 6.7 Týðandi frávik frá kostnaðarætlanum

6.7.1 Nær og hvussu nógv var fíggjarætlanin fyri verkætlanina broytt
6.7.2 Hvørjar arbeiðstøkur hava havt størstu meirútreiðslur við sær, og hvussu nógv
6.7.3 Hvørjir ráðgevarafeilir og/ella manglar hava havt størstu meirútreiðslur við sær, og hvussu stórar
6.7.4 Hvørjar meirútreiðslur til byggiplássrakstur hava staðist beinleiðis av tíðarseinkingum, og hvussu nógv
6.7.5 Hvørjar meirútreiðslur hava staðist beinleiðis av framskundaðum arbeiðum (”forcering”), og hvussu nógv
6.7.6 Fylgdi serstøk játtan við til framskundan av arbeiðum (”forcering”)
6.7.7 Var manglandi játtan orsøk til nakra tíðarseinking
6.7.8 Var manglandi projekttilfar og/ella seinkingar hjá ráðgevum orsøk til eykakrøv frá arbeiðstakarum
6.7.9 Vóru seinkingar hjá arbeiðstakarum orsøk til eykakrøv hjá øðrum arbeiðstakarum
6.7.10 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá projektleiðsluni orsøk til nakran meirkostna
6.7.11 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá byggiharranum (Landsverk) orsøk til nakran meirkostna
6.7.12 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá bygningsánara (Mentamálaráðið) orsøk til nakran meirkostnað
6.7.13 Aðrar orsøkir sum hava havt týðandi príshækkingar við sær, og hvussu nógv

# 7 Tíðarstýring av byggiverkætlanini

## 7.1 Tíðarstýring bygningsánarans (Mentamálaráðið)

7.1.1 Skipan av tíðarstýring bygningsánarans (Mentamálaráðið)

7.1.2 Tíðarkarmur hjá bygningsánaranum

7.1.3 Eftirlitsskipanir hjá bygningsánara

## 7.2 Tíðarstýring byggiharrans (Landsverk)

7.2.1 Skipan av tíðarstýring byggiharrans (Landsverk) av verkætlanini

7.2.2 Avtalugrundarlag

7.2.3 Verkætlanarhondbók

7.2.4 Aðrar leiðreglur til tíðarstýring

7.2.5 Eftirlitsskipanir

## 7.3 Tíðarætlan fyri verkætlanina

7.3.1 Tíðarætlan byggiharrans (Landsverk) fyri verkætlanina

7.3.2 Broytingar av tíðarætlanini

7.3.3 ”Kritisk tíðarlinja/-ur” í tíðarætlanini

7.3.4 Samsvar millum projekteringstíðarætlan og byggitíðarætlan

## 7.4 Innihald í loypandi tíðarstýringini

7.4.1 Statusfrágreiðingar

7.4.2 Mánaðarligar frágreiðingar

7.4.3 Loypandi tíðarætlan

7.4.4 Kvart-, hálv- ella heilárligar frágreiðingar

## 7.5 Innihald í regluligum gjøgnumgongdum av tíðarætlan

7.5.1 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um gongdina viðv. tíðarætlanini

7.5.2 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um seinkingar og orsøkir til tess í tíðarætlanini

7.5.3 Hvat vístu regluligu uppgerðirnar um longda tíðarætlan orsakað av eykaarbeiðum

7.5.4 Nær vóru tíðarseinkingar settar inn í regluligu frágreiðingarnar um gongdina við verkætlanini

## 7.6 Týðandi frávik frá tíðarætlanum

7.6.1 Nær og hvussu nógv var tíðarætlanin fyri verkætlanina broytt

7.6.2 Hvørjar arbeiðstøkur hava havt størstu seinkingarnar við sær, og hvussu stóra seinking

7.6.3 Hvørjir ráðgevarafeilir og/ella manglar hava havt størstu seinkingarnar við sær, og hvussu stóra seinking

7.6.4 Hvussu nógv kundu seinkingar vinnast innaftur við framskundan av arbeiðum ("forcering")

7.6.5 Var manglandi játtan orsøk til nakra tíðarseinking

7.6.6 Var manglandi projekttilfar og/ella seinkingar hjá ráðgevum orsøk til nakra tíðarseinking hjá arbeiðstakarum

7.6.7 Vóru seinkingar hjá arbeiðstakarum orsøk til tíðarseinking hjá øðrum arbeiðstakarum

7.6.8 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá projektleiðsluni orsøk til nakra tíðarseinking

7.6.9 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá byggiharranum (Landsverk) orsøk til nakra tíðarseinking

7.6.10 Vóru manglandi avgerðir ella onnur viðurskifti hjá bygningsánara (Mentamálaráðið) orsøk til nakra tíðarseinking

7.6.11 Aðrar orsøkir sum hava havt týðandi seinkingar við sær

# 8 Váðastýring

## 8.1 Týðandi váðar og ógreiður í samband við verkætlanina

8.1.1 Valdur leistur fyri kvalitativar váðametingar av byggiverkætlanini

8.1.2 Valdur leistur fyri kvantitativar váðametingar av byggiverkætlanini

8.1.3 Váðametingar í samband við fíggjarstýring av verkætlanini

8.1.4 Váðametingar í samband við tíðarstýring av verkætlanini

8.1.5 Regluligar váðametingar

8.1.6 Váðametingar av serligum hendingum (ad hoc)

8.1.7 Aðrar váðametingar

## 8.2 Váðametingar í samband við projektfasur og luttakandi partar í verkætlanini

8.2.1 Váðametingar í samband við projektorganisatión

8.2.2 Váðametingar í samband við projektleiðslu

8.2.3 Váðametingar í samband við projektering og projekteringsleiðslu

8.2.4 Váðametingar í samband við útboð, útboðshátt, lisitatiónsúrslit o.a.

8.2.5 Váðametingar í samband við umfatandi sparingar á 92 mió, sambært Løgtingsmál nr. 104/2012

8.2.6 Váðametingar í samband við arbeiðstøkur/bygging

8.2.7 Aðrar váðametingar í samband við projektfasur og luttakandi partar í verkætlanini

8.2.8 Váðametingar í samband við staðfestar projekterings- og/ella byggifeilir

8.2.9 Váðametingar í samband við uppsøgn av arbeiðstøku-/undirarbeiðstøkusáttmálum og/ella veitara-/undirveitarasáttmálum

# 9 Samskifti/kunning um fíggjarviðurskiftini og tíðarætlan fyri verkætlanina

## 9.1 Reglulig kunning um fíggjarstøðu og gongdin við verkætlanini

9.1.1 Statusfrágreiðingar

9.1.2 Mánaðarligar frágreiðingar

9.1.3 Loypandi byggiroknskapir

9.1.4 Kvart-, hálv- ella heilárligar frágreiðingar

## 9.2 Innihald í regluligu kunningini

9.2.1 Hvat vístu regluligar kunningar um fíggjarligu gongdina, tíðarætlan og týðandi váðar ?

## 9.3 Týðandi frávik frá kostnaðarætlanum og tíðarætlanum v.m.

9.3.1 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi seinkingar av projekteringstíðarætlanini

9.3.2 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi frávik við sjálvum byggiarbeiðinum

9.3.3 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi frávik frá kostnaðarætlanini

9.3.4 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi frávik frá tíðarætlanini

9.3.5 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi váðar

9.3.6 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi ósemjur við ráðgevar og/ella arbeiðstakarar/veitarar

9.3.7 Nær, hvussu ofta, hvussu og hvør var kunnaður um týðandi feilir og manglar hjá ráðgevum, arbeiðstakarum og veitarum

# 10 Handlings- og spariætlanir

## 10.1 Handlingsætlanir

10.1.1 Lýsing av gjørdum og endurskoðaðum handlingsætlanum

10.1.2 Leikluturin og uppfylgingin hjá leiðsluni hjá byggiharranum (Landsverk) í mun til handlingsætlanir

10.1.3 Leikluturin og uppfylgingin hjá avvarðandi ábyrgdarpersóni/-num hjá byggiánaranum (Mentamálaráðið) í mun til handlingsætlanir

## 10.2 Spariætlanir

10.2.1 Lýsing av gjørdum og endurskoðaðum spariætlanum

10.2.2 Leikluturin og uppfylgingin hjá leiðsluni hjá byggiharranum (Landsverk) í mun til handlingsætlanir

10.2.3 Leikluturin og uppfylgingin hjá avvarðandi ábyrgdarpersóni/-num hjá byggiánaranum (Mentamálaráðið) í mun til handlingsætlanir

## 10.3 Manglar og liðugtgerð

10.3.1 Lýsing av staðfestum manglum við og eftir avlevering

10.3.2 Lýsing av ætlanum og tíðarætlanum fyri gerð av manglum og liðugtgerð

10.3.3 Lýsing av ábyrgdarviðurskiftum í samband við staðfestar manglar

SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

# Fylgiskjal 2: Vegleiðandi skabelón til dagføring av høvuðspostum og frávikum

| GLASIR | Vegleiðandi fíggjaryvirlit | | | | | | | | | | | | | Dagfest | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Játtanir/fígging | | | Budgetstatus dec. 2018 | | | | | | | | Krøv | | |
| x 1000 kr. | | Játtan | Eykajáttan/ serjáttan | Samlað játtan (fígging) | Avsett (kostnaðarmeting/ budget) | Disponeraðir kostnaðir og skuldbindingar | Planløgd arbeiðir og nýtsla, íroknað meir-/minniveitingar og eykaarbeiðir | Avsettir reservar | Mett endalig nýtsla | Frávik | Staðfest nýtsla | Írestandi nýtsla | Krøv móti Landsverk | Mótkrøv hjá Landsverk | Stafest/avroknað krøv |
| | | 1 | 2 | 3 (=1+2) | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 (=5+6+7) | 9 (=4-8) | 10 | 11 (=8-10) | 9 | 10 | 11 |
| Projektleiðsla (Landsverk) | Lønir v.m. | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Umsitingarútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar projektleiðsluútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Advokat-/sakarkostnaðir | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| Fyrireiking og ráðgeving | Fyrireikingarútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Projekteringsútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Projekteringsleiðsla | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Byggileiðsla | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Eftirlit | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar útreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| Byggiútreiðslur | Jørð, kloakk, betong og stálarbeiði | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Innilokan | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Innrættan | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | El-arbeiði o.a. | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | HVS, lufskiftisskipanir o.a. | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Múraraarbeiði o.a. | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Málaraarbeiði o.a. | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Lendisarbeiði o.a. | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Serjáttan - grastekja | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Serjáttan - fjarhita-/jørðhitaskipan | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar serjáttanir | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar byggiútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| Veitingar | Leyst innbúgv | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Fast innbúgv og maskinur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | List | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar veitingarútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| Prístalsreguleringar | Projekteringsútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Byggiútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Veitingarútreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar prístalsreguleringar | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| Byggipláss og aðrar útreiðslur | Byggipláss | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | Aðrar útreiðslur | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| Óvæntaðar útreiðslur | (Buffari) | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |
| | | - | - | - | - | - | - | - | **#VÆRDI!** | **#VÆRDI!** | - | **#VÆRDI!** | - | - | - |
| TILSAMANS | | - | - | - | - | - | - | - | #VÆRDI! | #VÆRDI! | - | #VÆRDI! | - | - | - |